# Suzuki GSX 650F



MC
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Japanska Suzuki verksmiðjan er ein av heimsins størstu motorsúkkluverksmiðjum við einum stórum programmi við nógvum ymisk um motorsúkklum.

Ein av nýggjheitum frá Suziki er GSX 650F, sum er ein tekniskt framkomin og flott motorsúkkla.

At síggja til líkist Suzuki GSX 650F eini súkklu í Supersport klassanum, men í veruleikanum er hon ein





*Suzuki GSX 650F er ein væl koyrandi allround motorsúkkla*

Suzuki Bandit 650 við allari útgerð. Suzuki Bandit 650 varð av donskum motorsjournalistum kosin "Årets motorcykel 2007".

Suzuki GSX 650F hevur 4 syl. vatnkøldan motor við 656 kubikk og 85 hk við 10.500 snún/min. Toppferðin er 215 km/t. Kápan framman á GSX 650F verjir føraran væl undir koyring móti t.d. vindi, vatni og insektum. GSX 650F er ein væl koyrandi allround motorsúkkla.

Tað er MC-Sølan á Norðasta Horni í Havn, sum umboðar Suzuki motorsúkklurnar.

Á heimasíðuni: www.mc-solan.fo eru upplýsingar um úrvalið av t.d. motorsúkklum og skutarum og hópin av leikjum til aðrar MC-síður.

Suzuki GSX650F, sum fæst í tveimum litsamansetingum: hvít/blá ella svørt, kostar kr. 77.498,-

DEKKMASTER.FO
DM DEKKMASTER
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

MC-jakki
CE- góðkendur leðurjakki við verjum í albógvum, herðum og ryggi. Fæst í fleiri støddum.
einans
1.950,-



Fyri settið
10.800,-
18" New RS4
Við 225/40-18 dekkum
Original-look felgur til VW/Audi við 225/40-18 dekkum. Felgurnar verða latnar við boltum og VW/Audi-búmerkjum.



# KIA nr. fimm í Danmark

Eftir 12 ár á danska marknaðinum teljast Kia millum mest seldu bilmerkini í Danmark og liggja í dag sum nummar fimm. Serliga er tað KIA Cee'd við 7 ára garanti, sum er bestseljarin. .

KIA Import Danmark AS varð stovnað í 1996. Í ár verður roknað við sølu av umleið 8.000 bilum, sum svarar til eina framgongd upp á 15 prosent í mun til í 2007. KIA hava høvuðssæti í Fredericia.



*KIA Cee'd við 7 ára garanti er bestseljarin hjá KIA í Danmark*

# Nýggir bilar kunnu rusta

**Hóast bilarnir ongantíð áður hava verið so væl rustviðgjørdir og rustað so lítið sum hesi seinastu árini, eru tað enn fleiri bilframleiðarar sum ikki verja sínar bilar nóg væl móti rusti, skrivar FDM limablaðið Motor í februar útgávuni**

BILRØKT

Nógvir nýggir bilar eru sera væl rustviðgjørdir og verksmiðjurnar geva vanliga millum 6 og 12 ára gjøgnumteringsgaranti. Sambært FDM er sannleikin tann, at tað eru fleiri nýggir bilar, sum eru sera væl rustvardir, meðan aðrir burdu fingið eina rustviðgerð, áðrenn teir verða tiknir í nýtslu.

Hetta vísir ein kanning í Motor, sum er gjørd av 300 nýggjum bilmodellum frá 1997 til 2007. Kanningin er gjørd í samstarvi við blaðið Vi Bilägare, svenska samstarvsfelagan hjá FDM.

Onkrar verksmiðjur gera vart við, at um teirra bilar fáa eina eyka rustgerð í garantitíðini, tekur garantiið ikki við, um bilurin seinni fer at rusta. FDM ráða tí til, at rustviðgerð í garantitíðini verður gjørd í samráð við bilasøluna, har bilurin er keyptur.

Motor og Vi Bilägare hava vurderað samlaða kvalitetin av rustviðgerðini, sum t.d. um hvussu mótstøðuførkonstruktiónin er móti rusti, hvat slag av tilfari er brúkt og í hvønn mun veksmiðjan hevur brúkt effektiva rustverju. Kanningin vísti, at ikki allir bilar ikki eru nóg væl vardir móti rusti, sum t.d. í holrúmum og samlingum í konstruktiónini av bilunum.

*Kelda: FDM/Motor*



*Sambært FDM eru ikki allir bilar nóg væl vardir móti rusti, sum t.d. í holrúmum og samlingum í konstruktiónini av bilunum*